## Samskiparar fyri Nordplus Rammuskránna

**NOREG**
Senter for internasjonalisering av høgre utdanning – SIU
Tel: +47 55 30 88 00
Teldupostur: siu@siu.no
www.siu.no
Nordplus HORISONTAL
Høvuðssamskipar Nordplus Rammuskránna

**FINNLAND**
Centret för internationellt personutbyte CIMO
Tel: +358 207 868 500
Teldupostur: cimoinfo@cimo.fi
www.cimo.fi
Nordplus HÆGRI ÚTBÚGVING

**SVØRÍKI**
Internationella programkontoret
Tel: +46 8 453 72 00
Teldupostur: registrator@programkontoret.se
www.programkontoret.se
Nordplus JUNIOR

**DANMARK**
CIRIUS
Tel: +45 33 95 70 00
Teldupostur: cirius@ciriusmail.dk
www.ciriusonline.dk
Nordplus VAKSIN

## Ísland samskipar Nordplus skipanina Nordplus Mál og Mentan

**ÍSLAND**
International Office
Alþjóðaskrifstofa háskólastigsins
Tel: +354 525 4311
Teldupostur: ask@hi.is
www.ask.hi.is

## Kunningarskrivstovur í Baltalondunum

Nordplus skrivstovurnar í Baltalondunum hava bæði samábyrgd av øllum Nordplus skipanum og virka sum landsfevnandi kunningarskrivstovur

**ESTLAND**
Centre for Educational Programmes
Archimedes foundation
Sihtasutus Archimedes
Tel: +372 6 96 24 18
Teldupostur: arch@archimedes.ee
www.archimedes.ee

**LITAVA**
Education Exchanges Support Foundation
Švietimo mainų paramos fondas
Tel: +370 5 212 3364
Teldupostur: info@smpf.lt
www.smpf.lt

**LETLAND**
Academic Programme Agency
Akadēmisko programmu aģentūra
Tel: +371 67 280138
Teldupostur: apa@apa.lv
www.apa.lv

## Kunningarskrivstovur í sjálvstýrandi økjunum í samstarvi við ávikavist Danmark og Finnland

**FØROYAR**
International Office
Altjóða Skrivstovan
Tel: +298 322065
Teldupostur: ask@ask.fo
www.ask.fo

**ÁLAND**
Ålands Landskapsregering, utbildnings- och kulturavdelningen
Självstyrelsegården
Tel: +358 18 25 000
www.regeringen.ax

**GRØNLAND**
Nordens institut i Grønland/NAPA
Tel: +299 32 47 33
www.napa.gl

NORDPLUS

norden



# NORDPLUS RAMMUSKRÁ

Mobilitetur, verkætlanir og netverk í Norðurlondum og í Baltalondum 2008-2011

NORDPLUS

**Nordplus er ein útbúgvingarskipan hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Nordplus er sett saman av eini rammuskrá, ið fevnir um fýra skipanir, sum venda sær til ymsar málbólkar frá barnaskúla til hægri útbúgvingar.**

Nordplus veitir góðan fíggjarligan stuðul til mobilitet, verkætlanir og netverk og vendir sær til allar stovnar, felagsskapir og onnur áhugað, sum arbeiða við útbúgving og lívslangari læring.

Nordplus fevnir um Norðurlond, har ímillum Føroyar, Grønland og Áland umframt Baltalondini Estland, Letland og Litava.

Nordplus rammuskráin fevnir um:
- Nordplus JUNIOR
- Nordplus HÆGRI ÚTBÚGVING
- Nordplus VAKSIN
- Nordplus HORISONTAL

Skrivstovur, sum umsita Nordplusskipanirnar, eru í øllum fimm Norðurlondum. Nordplus skrivstovurnar í Noregi, Svøríki, Finnlandi og Danmark hava hvør sær høvuðsábyrgd av eini Nordplus skipan, og tær hava samábyrgd av øðrum skipanum.

Skipanin Nordplus Mál og Mentan er ikki partur av rammuskránni. Ísland hevur høvuðsábyrgd av at samskipa hesa skipan.

Les meira á www.nordplusonline.org



## Endamálið við Nordplus rammuskránni er, at:

- menna dygd og nýskapan í útbúgvingarskipanunum við atliti at lívslangari læring
- við skipaðum umbýti av royndum og góðari praksis at stuðla, menna, gagnnýta og kunna um nýskapandi lærumøguleikar og arbeiðshættir í sambandi við útbúgving
- styrkja og menna norðurlendskt samstarv innan útbúgving og virka fyri at stovnseta eitt norðurlendskt-baltiskt útbúgvingarøki
- virka fyri norðurlendskari og baltiskari mál- og mentanarfatan

**Nordplus JUNIOR**
styrkir og mennir samstarv millum skúlar á øllum stigum. Barnagarðar, fólkaskúlar, framhaldsskúlar og miðnámsskúlar kunnu allir taka lut.

**Nordplus HÆGRI ÚTBÚGVING**
styrkir sambandið millum hægri útbúgvingarstovnar í luttakandi londunum.

**Nordplus VAKSIN**
styrkir samstarv og er netverks- og samvinnuskapandi fyri vaksnamannaútbúgvingar og fólkaupplýsingarøkið.

**Nordplus HORISONTAL**
virkar fyri øktari synergi og samstarvi tvørtur um virksemið í einstøku Nordplus skipanunum.

